**Tíðargreinin: eitt íkast til føroyska orðaskiftið**
Sosialurin hevur tíðargrein í blaðnum týsdag og hósdag. Hevur tú hug at gera títt íkast til føroyska kjakið í 2009?
Send eina grein til post@sosialurin.fo - Kravið er, at greinin er á leið 6000 tekn og skrivað í essay stíli



# Hvørjar treytir verða fyri aling í framtíðini?

TÍÐARGREININ
*Dánjal Petur Højgaard, lívfrøðingur*

**Umboð fyri alivinnuna og WWF (World Wildlife Fund) hava fundast í Føroyum um treytirnar, sum skulu galda fyri aling í framtíðini. Dánjal Petur Højgaard, lívfrøðingur var við á fundunum**

**Aling og framtíðin**
Ætlanin er at fáa ásett felags viðtøkur fyri aling kring allan heim. Hetta arbeiðið skal verða liðugt í 2011. Evnini eru heilsa og trivnaður hjá alifiskum (ella øðrum aldum dýrum og tara), umhvørvisárin, fóðurviðurskifti, arbeiðsviðurskifti hjá starvsfólki og samfelagsligur týdningur.

Samskipari fyri hesum tiltaki, ið byrjaði í 2008 í Keypmannahavn, er Christoph Michelsen, ið starvast hjá WWF í Danmark. Fundur nr. 2 er júst hildin á Hotel Føroyum, mikudagin, 27 og hósdagin, 28. mai.

Fundurin í Føroyum eydnaðist væl. Her var ein breið luttøka frá allari vinnuni og frá nógvum ymiskum londum. Hesaferð var tað serliga síla-alingin, ið var á skránni; men fyri framman standa onnur fiskasløg á skránni sum t.d. laksur, tilapia, rækjur, skeljadýr (ostra, kræklingur, jákupsskel).

Fundurin er fyriskipaður av WWF (World Worldlife Fund) og nevnist FTAD (Freshwater Trout Aquaculture Dialogue). Tey luttakandi eru úr mongum ymsum felagsskapum, ið hava við alivinnu at gera, umframt almenn starvsfólk, vísindafólk og teknikarar. Innan lógarverkið í teim ymsu londunum er ætlanin at finna fram til felags, standard viðtøkur, ið vinnan sjálvboðin skal samtykkja at ganga undir. Sostatt er ikki talan um nýtt lógarverk, ið verður gjørt frá í erva. Fyrra dagin vóru ymsar fakligar framløgur. Seinna dagin vóru kjak um felags niðurstøður at nýta til komandi fundir.

Arbeiðsætlanin í fundarrøðunum er í høvuðsheitum hendan: Árin-Prinsipp-Kriteria-Indikatorar...ið eftir viðgerð førir til felags standardir fyri alla alivinnu (umhvørvi, fóður, vøru, arbeiðsviðurskifti o.a.).

Næsti fundur skal haldast longu til heystar í Spania. Soleiðis verður hildið fram, til 2011, har almennar hoyringar eisini vera um tey náddu málini.

Við tað, at bæði alivørur og veiddar vørur í alt størri mun fara at vera umhvørvismerktar, fer hetta uttan iva eisini at hava sín týdning í komandi tíðum fyri føroyska alivinnu. Krøv um burðardygd koma at vera í øllum framleiðsluliðum.

Tí hevur slíkur fundur stóran týdning fyri Føroyar og føroyskar alarar eisini. Vit eiga at geva tí, sum kemur fram á slíkum fundum størstan gætur.

Tíðargreinin

# Miðvarp, Kringvarp ella Míttvarp?

PÁLL Á REYNATÚGVU
borgarstjóri á Sandi



**Samstundis sum Kringvarpið eigur tøkk uppiborna fyri Kjakaríið, sum varð sent beinleiðis úr Skopun við evninum kommunusamanlegging í Sandoynni, so eru tað eftirhondini nógv her á Sandi, sum hava lagt til merkis, hvussu selektivur tíðindaflutningurin úr Sandoynni er**

Tí hóast vit á Sandi jú gleðast um tað góða, sum hendir kring landið av smásøgum og stórtíðindum, so er einki at taka seg aftur í, at tíðindaflutningurin úr oynni ikki hevur verið serliga myndandi fyri bygdina og virksemi á Sandi. Skal til kunningar nevna trinni evni, sum ein lættliga kundi viðgjørt í tíðindahøpi, ella sum smásøgur í morgunútvarpi.

**Nýggi barnaskúlin á Sandi**
28. februar var nýggi barnaskúlin á Sandi alment tikin í nýtslu. Hóast innbjóðing var hvørki sjónvarp ella útvarp á staðnum. Avgerðin um at byggja skúlan var jú ein av teimum heitastu í bygdini, og stríðið fekk rúma innivist í miðlunum. Júst tí kundi tað verið spennandi hjá Kringvarpinum at lisið kringumstøðurnar, nú skúlin varð liðugur. Vóru fólk nøgd, ónøgd og helt kostnaðarætlanin, sum "by the way" sigur at skúlin er bíligast bygdi skúlin í landinum. Samstundis sum almennu skúlabyggingarnar spreingja allar mettar fíggjarætlanir. Enn eitt viðkomandi sjónarhorn í kritiskum journalistikki. Harumframt er hettar fyrsti skúlin á Sandi í 125 ár. Hann hevur alskyns hentleikar. Er bygdur í samlóði við náttúruna, og so snýr hettar seg um bleyt virði, tá tey eru best!

**Útivikan 2009**
Fólkaheilsuráðið tók stig til eina Útiviku í mai. Sands Kommuna, saman við sjálvbodnum, tók tiltakið til sín og skipaði fyri nógvum útitiltøkum. Eitt nú varð tilhaldið Hugnin á grillútferð. Trinni kvøld vóru beachvolley tiltøk á sandinum, saman við øðrum bóltspølum, og grilltiltaki fríggjakvøldið. Fleiri skipaðir gongutúrar vóru við ferðaleiðara, og seinast men kanska týdningarmest, so skipa Sands Skúli og Sands Kommuna í felag fyri 6 vikur langari kapping millum skúlanæmingar um hvør teirra er raskast at ganga ella súkkla í og úr skúla í nevnda tíðarskeiði. Bleyt virðir so tað forslær, men einki afturljóð úr Kringvarpinum.

**Fyrsta bygda bókasavnið uttan fyri Havnina**
Í gjár var móttøka í samband við at Sands Kommuna takkaði Daniellu Olsen, (96 ár í gjár) fyri ovurhonds stóru gávuna hon hevur givið heimbygdini, nýggja bókasavnið á Sandi. Martin Næs frá Mentamálaráðnum upplýsti stóru samkomuni, at hettar er fyrsta bygda bókasavnið, uttan fyri høvuðsstaðin. Eitt hetjuavrik hjá Daniellu Olsen, sum ikki verður minni hetjukent, av at hon er kvinna og hevur strítt seg gjøgnum eitt avbjóðingaríkt lív á leiðini. Bleyt virðir við nærum vónleysum fortreytum, men ongan áhuga hjá almenna Kringvarpi okkara.

Felags fyri øll tiltøkini er, at tey eru lýst við kunningarskrivi, sum er sent til hvørt húsarhald í kommununi, og harumframt hava fingið innivist á www.sandportal.fo og www.visitsandoy.com

Gamaní, at alt ikki verður tugt og tannlað í tíðindasendingum, men somikið av tíðindavirði er í hesum trimum dømum, at onkur við tí minsta av tilknýti til Sandoynna, ella við ábyrgd fyri almenna tíðindaflutinginum eigur at »fanga« hesi avgjørt týdningarmiklu tiltøk á Sandi og fyri landið við.

**Okkara Kringvarp?**
Vóni ikki, at hvør ið heldur á mikrofonini, er avgerandi fyri hvagar mikrofonirnar hjá almenna Kringvarpi okkara røkka, men tað er nógv sum bendir á tann bógvin. Skuldi mín illgruni verið á leið, so er trupult framhaldandi at argumentera fyri einum óheftum public service stovni. Tí, skal stovnurin hava álit og undirtøku í fólkinum, so er týdningarmikið at Kringvarpið virkar um landið alt, og at tíðindavalini ikki byggja á litaðar persónligar støðutakanir, men á fakliga og sakliga journalistiska grund.

# Børn skulu trívast í egnum likami

TÓRA VIÐ KELDU
hjarta@kallnet.fo



**Barnið er treytaleyst bundið at vaksnum fólki í menningini sum sosial sjálvstøðug vera - tó er barnið einstaklingur. Barnið stendur einsamt í fjøldini, og skal læra at liva lív sítt í heimliga umhvørvinum**

**Brynja børnini at liva egið lív**
Fram um djór hevur menniskjað hugsan. Hugsan, sum ger okkum serstøk og virðismikil. Hóast sterk íborðin gen, kunnu vit ikki síggja burtur frá, at lívið, sum livir rundan um okkum, vissuliga hevur stóra ávirkan á hugsan okkara.

Heima læra børnini at liva. Tað er sera týdningarmikið, at vit vaksnu eru tilvitað um hetta, taka ábyrgd, seta mørk og eru ein partur av lívinum hjá børnunum - so tey læra at liva og virða seg sjálvan og onnur.

**At trívast í egnum likami**
Barnið er treytaleyst bundið at vaksnum fólki í menningini sum sosial sjálvstøðug vera. Veruleikin er, at við einum mennandi sosialum umhvørvi, kunnu vit brynja børnini at liva egið lív og trívast í givnum likami. Hetta er í sjálvum sær málið.

**Hugsið um hetta**
Treytin fyri eini livandi hugsan er, at børn duga og hava álit á sær sjálvum at hugsa sjálvstøðugt. Haldi tó, at vit krevja alt ov tíðliga av børnum okkara, at tey skulu vera før fyri at døma um, hvat er rætt, og hvat tey sjálvi halda. Hetta er ein tíðarkrevjandi tilgongd og menning av persónsmensku. Hetta er evni at siga, hvat satt, rætt og sámuligt er.

At vit vaksnu ikki vísa ábyrgd og ikki geva nóg greið signal, er ein av orsøkunum til, at børnini kunnu halda, at vit eru líkasæl. Áðrenn børn eru búgvin til tað, fáa fleiri alt ov stóra ábyrgd. "Hatta finnur tú sjálv útav" ella "hvat heldur tú?".

**Persónligur førleiki**
Eisini er tað av stórum týdningi, at persónligur førleiki hjá barninum liggur sum grundarlag fyri tí, vit krevja, at tey duga. Vit eiga sjálvsagt at seta høgt í virði evni teirra at hugsa og geva teimum rúm og tíð at gera og menna tað. Tó eigur hetta at vera í einum umhvørvi saman við vaksnum.

Vaksin ávirka við samveru. Ofta meta vaksin tað tó sum ov lítlan heiður at hugsa og tosa um tað, sum væl verður talað um, og tí hoyra og síggja børn tað, sum darvar mennandi og fríu hugsan teirra, og minni dygd liggur tí eisini í at gera sítt besta.

Dygd er í, at barnið sleppur at vera barn í gerandisdegnum. Hetta gevur barninum sjálvsálit, sum eisini kemur teimum til góða seinni í lívinum.

**Heild í gerandisdegnum**
Tað, sum eg síggi sum ein mangul í føroyska fólkaskúlanum, og sum vit eisini kenna sum ein trupulleika í grannalondum okkara, er eina heild í gerandisdegnum hjá næmingunum - hetta eru tey, sum eg oman fyri kalli børn. At tey vaksnu, sum eru um næmingarnar taka ábyrgd, seta mørk, hava virðing fyri læru og sjónliga seta heiður í, at næmingarnir gera sær ómak. At tey ikki síggja skúlan sum ein ansingarstovn, men ein lærustovn.

Barnið eigur at kenna gerandisdagin sum eina góða og mennandi heild, har barnið veit, hvat verður kravt og er fyrireikað bæði at fáa og at geva. Í sosialu menningini liggur stórur týdningur í at vera eitt spælandi barn. Hetta er fyrireikandi arbeiðið vit vaksnu eiga gera. Her fær næmingurin pláss at vera barn, at læra at liva og fer uttan iva at trívist í likami sínum.